# ongan veg





*Í Kolbeinagjógv búgva 41 fólk í 11 húsum. Fólkatalið hevur verið støðugt tey seinastu árini, men var eitt skiftið heilt niðri á 32*



*Kolbeinagjógv er niðursetubygd frá 1933. Til tess at minnast hetta hevur bygdarfólkið reist ein minnisvarða í bygdini*

rættiliga siðbundnum arbeiðum, millum annað í høvuðsbygdini í kommununi, Strondum.

Teir flestu menninir sigla úti ella fáast við útróður, meðan konufólkið fyri tað mesta arbeiðir í fiski ella í barnagarði.

Hóast ein fremmandur helst hevur ilt við at fáa eyga á nakran trivnað í Kolbeinagjógv, so verður roynt at skipa fyri ymiskum tiltøkum fyri bygdarfólkið gjøgnum árið, millum annað á nýggjárinum.

Annars er støðan hon, sum áður nevnt, at tey flestu sum búgva her, hava eitthvørt tilknýti til bygdina - í øllum førum annar parturin.

## Livandi

Meinhard Jacobsen er føddur og uppvaksin her í Kolbeinagjógv, og er fegin um tað.

Hann er sannførdur um, at hóast bygdin er sárbær við so lítlum fólkatalið, skal nógv til at hon fer at doyggja út.

Kolbeinagjógv er jú partur av Sjóvar kommunu, og hóast tveir kilometrar eru í vegalongd yvir hagar, so er gongdin hon, at tað gerst tættari og tættari millum tær, so hvørt sum útstykkingar verða gjørdar á Strondum - og vónandi eisini í heimbygd hansara.

- Eg vænti, at tá tann næsta stóra útstykkingin verða framd um Hálsin á Strondum, tá er ein komin allan vegin yvirum higar. Tá fara vit helst at kunna síggja húsini higani frá, staðfestir hann.

## Menningarætlan

Meinhard situr sjálvur í bygdaráðnum á Strondum, og er í roynd og veru einasta umboðið fyri tær tríggjar bygdirnar á vestursíðuni - Kolbeinagjógv, Morskranes og Selatrað.

Hansara hægsta ynski er, at øll kommunan, og eisini hesar bygdirnar skulu mennast í framtíðini og at fólk skulu fáa umstøður at seta búgv her.

Sjóvar kommuna hevur gjørt eina umfatandi menningarætlan fyri alt økið, og her eru eisini ymiskar ætlanir fyri Kolbeinagjógv. Hetta frøist Meinhard eisini um, nú ætlanir er um at gera ein tunnil millum Skálafjørðin og Havnina.

- Mær dámar sera væl her í Kolbeinagjógv. Ein trívist jú altíð best, har sum rótin rann, sigur hann.

**Í einum seinni blaði fara vit at hava eina longri samrøðu við Meinhard um heimbygdina og framtíðarmøguleikar hennara.**

*Ein fremmandur hevur helst ilt við at fáa eyga á nakran trivnað í Kolbeinagjógv*

*Ein trívist jú altíð best, har sum rótin rann*

*Meinhard Jacobsen, Kolbeinagjógv*

*Onkur kallar bygdina Kolbanagjógv og onkur annar Kolbanargjógv, men bygdarfólkið er ikki í iva*